# Býráðsfundur 27.01.2025

**<u>Býráðsfundur 27.01.2025 kl. 18.00</u>**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Fundarhølið | |
| Hjástødd: | Súni í Hjøllum, borgarstjóri | x |
| | Atli F. Johansen | x |
| | Rannvá í Túni Petersen | x |
| | Elin Ó. á Torkilsheyggi | x |
| | Henning Erhardsson Joensen | x |
| | Høgni Hansen | x |
| | Niels Jacob Nielsen | x |
| | Elsbet E. Magnussen, skrivari | x |

**<u>Mál til viðgerðar:</u>**

| | |
|---|---|
| Mál nr. 01/2025 – Limir í nevndina fyri Bókasavnið í Nes kommunu | ALMENT |
| Mál nr. 02/2025 – Mannagongd viðv. stuðuli til skúlaflokkar og ítróttarlið | ALMENT |
| Mál nr. 03/2025 – Umsókn um uppískoytisstykki – Jóhan Dávur Højgaard | ALMENT |
| Mál nr. 04/2025 – | AFTURLATIÐ |
| Mál nr. 05/2025 – Nýggj maskina til teknisku deild | ALMENT |
| Mál nr. 06/2025 – | AFTURLATIÐ |
| Mál nr. 07/2025 – | AFTURLATIÐ |
| Mál nr. 08/2025 – Broyting í Kommunustýrisskipanini | ALMENT |
| Mál nr. 09/2025 – Upptøka av láni – Nes kommuna | ALMENT |

**<u>Mál nr. 01/2025 – Limir í nevndina fyri Bókasavnið í Nes kommunu ALMENT</u>**
<u>J.nr.:1101-68-2024</u>

Eftir hvørt kommunuval skal nevndin fyri Bygdabókasavnið veljast. Í seinasta valskeiði sótu: Jaspur Langaard, Hallfríð Hammer í Hjøllum og Høgni Hansen, sum umboðaði Nes kommunu.

Jaspur og Høgni hava boðað frá, at teir ynskja ikki afturval.

Fyrisitingin hevur fyrireikað málið og mælir til at velja:

Sigrun Højgaard, sum arbeiðir sum stuðul í skúlanum
Hallfríð Hammer í Hjøllum, lærara
Súna í Hjøllum, borgarstjóra, vegna Nes kommunu

Skrivari í nevndini er bókavørðurin, sum er Anna Maria Olsen.

**Á fundi, tann 16.01.2025, mælir Mentanarnevndin til at velja Sigrun Højgaard, Hallfríð Hammer í Hjøllum og Súna í Hjøllum í bókasavnsnevndina.**

**Tilmælið hjá Mentanarnevndini varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 02/2025 – Mannagongd viðv. stuðuli til skúlaflokkar og ítróttarlið ALMENT**
J.nr.: 2206-1-2025

Á fundi, tann 17.01.2024, avgjørdi Tekniska nevnd, at næmingar úr Nes kommunu kunnu fáa eina samsýning á kr. 1.000 í part, um tey gera okkurt arbeiði fyri kommununa í 8 tímar. Samsýningin verður goldin, tá arbeiðið er gjørt. Arbeiðið skal samskipast við Teknisku deild.

Somuleiðis varð avgjørt, at umsitingin fekk heimild at avgreiða umsóknirnar í eini royndarskipan í 2024.

Umsitingin metir, at skipanin hevur virkað væl.
Kommunan fær nógvar stuðulsumsóknir frá skúlaflokkum, ítróttarfólkum og næmingum úr Nes kommunu. Umsitingin metir ikki, at tað er ein kommunal uppgávu at veita ungum stuðul til námsferðir, ítróttarferðir o.a., men við hesi skipan kunnu tey gera eitt arbeiði, sum kommunan hevur brúk fyri. Fyri hetta kunnu tey so fáa eina samsýning.

Fyri at tryggja gjøgnumskygni og fyri at lætta um viðgerðina av slíkum umsóknum, hevur verið sera gott við einum føstum leisti.

Royndartíðin við skipanini er liðug, og tí er neyðugt, at Mentanarnevndin tekur støðu til skipanina framyvir.

**Á fundi, tann 16.01.2025, mælir Mentanarnevndin til at gera skipanina varandi, men at ung undir 14 ár mugu gera arbeiðið saman við vaksnum.**

**Á fundi, tann 20.01.2025, mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við tilmælinum hjá Mentanarnevndini.**

**Tilmælini hjá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vórðu einmælt samtykt.**

**Mál nr. 03/2025 – Umsókn um uppískoytisstykki – Jóhan Dávur Højgaard ALMENT**
J.nr.: 1205-6-2024

Í teldubrævi, dagfest tann 11.01.2025, søkir Jóhan Dávur Højgaard um uppískoytisstykki til matr. nr. 267t. Endamálið er at byggja eini tvíhús á stykkinum, heldur enn eini sethús, so at umsøkjarin og beiggi hansara kunnu byggja saman.

Søkt verður um 7x24m ella 168m2 norðanfyri verandi grundstykki.

Tekniski leiðarin metir ikki, at víðkanin hevði verið ein forðan fyri eina vegaverkætlan niðan í økið omanfyri.

**Á fundi, tann 16.01.2025, mælir Tekniska nevnd til at viðmæla uppískoytisstykkinum.**

**Tilmælið hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 05/2025 – Nýggj maskina til teknisku deild ALMENT**

J.nr.: 2901-3-2024

Tekniska deild hjá Nes kommunu hevur tørv á nýggjari maskinu til raksturin. Tekniski leiðarin hevur kannað møguleikar og mett um tørvin saman við arbeiðsformanninum og maskinføraranum. Teir hava fingið tilboð uppá hesar maskinurnar saman við tilhoyrandi útgerð:

- Takeuchi TB225.
- Hyundai R25Z-9AK stel E1209.
- JCB 25Z
  .

Tekniski leiðarin og maskinførarin mæla til keyp av JCB maskinuni.
Tilmælið er grundað á, at JCB maskinan hóskar best til tørvin hjá kommununi, m.a. tá dupultgravir skulu gravast.
Mett verður, at Hyundai maskinan ikki nøktar tørvin hjá kommununi, tí at hon røkkur ov stutt. Somuleiðis hevur tekniska toymið ringar royndir við Takeuhci maskinum, tí tær hava kravt nógvar ábøtur.

Kostnaðurin fyri JCB maskinuna við útgerð u/mvg (og tá núverandi maskina og dumpari eru tikin inn):

| | |
|---|---|
| JCB 25Z | kr. 243.413 |

Kostnaðurin er treytaður av, at KJ tekur núverandi maskinu innaftur við einum virði á kr. 230.000. Í verandi løtu er ein opin tryggingarskaði, ið umfatar eitt defekt stempul í motorinum.

**Á fundi, tann 16.01.2025, mælir Tekniska nevnd til at taka av tilboðnum uppá JCB 25Z maskinuna.**

**Á fundi, tann 20.01.2025, mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd og at fíggingin á kr. 243.413 verður tikin av stovninum "Minigravari".**

**Tilmælini hjá Teknisku nevnd og Fíggjarnecndini vórðu einmælt samtykt.**

# Býráðsfundur 27.01.2025

**Mál nr. 08/2025 – Broyting í Kommunustýrisskipanini 1. viðgerð ALMENT**
J.nr.: 1101-16-2025

Í sambandi við, at nýggja býráðið skipaði seg, varð avtalað at avtaka nevndina Burðardygd. Tí er neyðugt at broyta kommunustýrisskipanina samsvarandi.

Umsitingin mælir til at leggja fylgjandi økir aftur til Teknisku nevnd at umsita:

- El, vatn, hiti o.a.
- Orkuplanlegging
- Umhvørvi, umhvørvislóggáva
- Náttúra, frílendi

Økini, sum vóru umsitin í samstarvi millum Burðardygd og Mentanarnevndina, verða nú bert umsitin av Mentanarnevndini.

Harafturat verður orðaljóðið í §3 stk 1, um samsýning til borgarstjóran broytt samsvarandi Kunngerð nr. 93 um samsýningar sambært Kommunustýrislógini.

**Á fundi, tann 20.01.2025, mælir Fíggjarnevndin til at broyta Kommunustýrisskipanina sum nevnt omanfyri.**

**Tilmælið hjá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt við 1. viðgerð.**

**Mál nr. 09/2025 – Upptøka av láni – Nes kommuna ALMENT**
J.nr.: 1108-1-2025

Umsitingin hevur verið í samskifti við Føroya Banka um lánimøguleikar. Bankin hevur játtað at økja kassakredittin hjá bankanum við 18 mió. kr. upp til 35 mió. kr.
Rentan er variabul, og er í løtuni 3,6 % av trektum kassakreditti+ 0,25 % av samlaða kassakredittinum á 35 mió. kr. Kassakreditturin gongur út 31.03.2027, og skal tá umleggjast til vanligt lán.

Tørvurin á lántøku kemur frá 8,3 mió. kr. í RLÚ-undirskoti og lánsafturgjaldi á 2,9 mió. kr. í fíggjarætlan 2025, framflyting av íløgujáttanum frá 2024 til 2025 á 17 mió. kr., og frá tørvi á 1 mió. kr. til tøkt gjaldføri til kommununa. Tøki kassakreditturin er í løtuni 11,2 mió. kr., og er nettotørvurin á gjaldføri tí 18 mió. kr.

Sí annars hjálagda lánitilboð frá Føroya Banka.

**Á fundi, tann 20.01.2025, mælir Fíggjarnevndin til at økja kassakredittin upp til 35 mio. kr og sostatt taka av lánitilboðnum frá Føroya Banka.**

**Tilmælið hjá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**